TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 30. mai 2024 uppskot um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes.

Uppskotið um endurskoðanina fevnir um broytingar og tillagingar av býarskipanini, m.a. soleiðis at lýsingar fyri ásetingar í størri mun samsvara við almennu byggi-samtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 18. september til 30. oktober 2024.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 30. oktober 2024.



